Stýrisskipanarlógin:

# Løgmaður eftirlit við landsstýrismonnum

**Stýrisskipanarlógin sigur, at løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Sambært ákærunum frá Dagmar Joensen, so hevur Bjarni Djurholm slett ikki uppfylgt hesar treytir**

STÝRISSKIPANARLÓGIN
*Rólant Waag Dam*
rolant@sosialurin.fo

Kortini hevur hann ikki nakrar viðmerkingar til málið, annað enn tað, hann segði við Útvarpið fríggjadagin, har hann vísti ákærunum aftur, sum heilaspuna og konspiratiónsteoriir. Bjarni Djurholm hevur heldur ongar viðmerkingar til spuringin, um hansara trúvirði sum landsstýrismaður hevur tikið skaða av hvøssu atfinningunum frá Dagmar Joensen, sum millum annað ganga út uppá, at hann skal hava hótt hana í samband við søluna av Faroe Seafood. Hesar ákærurnar váttaði Árni Dam, sum var næstformaður í framtaksgrunninum í fleiri ár, í Útvarpinum fríggjadagin, at hann hevði verið vitni til.

Dagmar Joensen sigur, at hon ikki fær prógva ákærurnar, hon setir móti landsstýrismanninum. Men greitt er, at tað ber til at staðfesta, um telefonin hjá Bjarna Djurholm hevur ringt til Dagmar, hvussu ofta og nær. Eisini ber til at staðfesta, hvør eigur telefonina, um talan hevur verið um dult nummar. Hetta skal gerast við rættarloyvið.

**Tingið skal ikki viðgera málið**

Í §33 stk. 3 stendur greitt, at løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Passa skuldsetingarnar, so hevur Bjarni Djurholm ikki uppfylgt hesar treytirnar. Men løgmaður hevur ikki aðrar viðmerkingar til málið, annað enn tað, sum hann segði í svarið sínum 16. mars til Dagmar, har hann sigur: "Aftaná at hava lisið kæruna og ummælini av henni, eri eg komin til ta niðurstøðu, at einki tykist at vera at finnast at í viðgerð Vinnumálaráðsins av málinum.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, boðaði í dag frá, at hann ikki fer at ganga áheitanina frá Miðflokkinum á møti, um at kalla tingið saman at viðgera málið.



*Bjarni Djurholm hevur ongar viðmerkingar til málið, annað enn tað hann segði við Útvarpið fríggjadagin, har hann afturvísti øllum ákærunum sum heilaspuni og konspiratiónsteoriir*




Hvønn dag í mai mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 5. juni kl. 10.00 og merkið bjálvan »Sudoku«.

Vinningurin er ein bilpakkatúrur fyri 4 fólk til Bergen og aftur frá Smyril Line, virði umleið kr. 8.000,-

Drigið verður fyrstu vikuna í juni.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar vera loystar.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50
BOOKING@SMYRIL-LINE.FO
WWW.SMYRIL-LINE.FO

## MAI KAPPING

SUDOKU

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | | 1 | 8 | | 9 | | | 2 |
| | 9 | | | 2 | 6 | | 5 | |
| | 8 | | | | | 4 | 7 | |
| | 4 | | | | 7 | 3 | | |
| 6 | | 2 | 5 | | 4 | 7 | | 1 |
| | | 5 | 3 | | | | 9 | |
| | 5 | 4 | | | | | 1 | |
| | 6 | | 4 | 8 | | | 2 | |
| 1 | | | 9 | | 3 | 8 | | 6 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | | 3 | | 2 | | 4 | | 7 |
| | | 2 | | | | 1 | | |
| 8 | | | 6 | | 7 | | | 5 |
| | 6 | | 1 | 8 | 5 | | 7 | |
| | | | | | | | | |
| | 5 | | 3 | 9 | 6 | | 2 | |
| 4 | | | 8 | | 2 | | | 6 |
| | | 7 | | | | 5 | | |
| 3 | | 6 | | 5 | | 9 | | 2 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 7 | | | | 8 | | | |
| | | 1 | 9 | | | | | 7 |
| | | 3 | 1 | 2 | | 6 | 9 | |
| 6 | | | | | | 8 | 4 | |
| | | 7 | | | | 2 | | |
| | 8 | 4 | | | | | | 3 |
| | 6 | 8 | | 5 | 3 | 7 | | |
| 4 | | | | | 1 | 5 | | |
| | | | 8 | | | | 1 | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 8 | 1 | | | | | |
| | | 4 | | | | | | |
| | 7 | | 8 | | 2 | | | 9 |
| | 5 | | | | 9 | | 8 | |
| | 2 | 3 | | | | 5 | 6 | |
| | 4 | | 7 | | | | 3 | |
| 1 | | | 2 | | 4 | | 9 | |
| | | | | | | 8 | | |
| | | | | | 5 | 3 | | |

TRUPUL

NAVN: ____________________ BÚSTAÐUR: ____________________

TELEFON: ____________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin